# PREP-SKEIÐ FYRI HJÚN

EITT ÓGLOYMANDI VIKUSKIFTI FYRI TYKKUM BÆÐI Á HOTEL NORÐ

Setið vikuskiftið 6.-7. oktober í kalendaran! Samkoman Lívdin skipar fyri PREP- skeiði, sum er fyri øll, ið vilja fáa íblástur og vegleiðing at samskifta og at liva saman sum hjún. Vit byrja leygarmorgun við morgunmati og enda sunnudag seinnapart. Tit skulu ikki hugsa um matgerð, uppvask, avrudding, arbeiði ella børn. Tit skulu bert hugsa um tykkum sjálv!

Hvør vil ikki gera íløgu í eitt skeið, sum gevur amboð, ið kunnu geva hjúnalagnum 50% størri møguleika at halda? Hvør vil ikki læra um kærleika, lívsvirðir, lívsáskoðanir, samskifti, væntanir, leiklutir, vandaeyðkenni, at handfara ósemjur, vinalag, kynslív, kenslulív, halgan og fyrigeving í hjúnabandinum?

Skeiðið er lætt og stuttligt, og skift verður millum undirvísing, venjingar og hugna. Grundarlagið fyri skeiðnum er bíbilskt, men tað byggir eisini á vísindaligar kanningar við hjúnum gjøgnum 30 ár.

**Tit skulu ikki vera bangin fyri at sita í bólkum og luta innastu kenslur tykkara, tí einki bólkaarbeiði verður.** Tær venjingar, sum verða, verða bert saman við hjúnafelaganum.

**Skeiðið verður á Hotel Norð 6. og 7. oktober 2007**
Kostnaður er 2.800 kr fyri parið. Kostnaðurin umfatar gisting við fullum kosti og undirvísingartilfar.
Kostur: Morgunmatur tvær ferðir, millummáli tvær ferðir, kaffi fimm ferðir og døgurði leygarkvøldið. Drykkjuvørur eru ikki íroknaðar.

Seinast freist fyri tekning og gjalding er 14 dagar undan skeiðnum, men tit kunnu sjálvandi bjóða øðrum pari tykkara pláss, um tit fáa forfall.

Tilmelding fer fram hjá Paula og Duritu Djurholm á telefon 316099 ella á prep@livdin.fo

**Undirvísarar:**
Unn og Jógvan Zachariassen
Durita og Pauli Djurholm
Elin og Jens Wang

**Pláss er fyri 12 pørum!**